MYND: JENS KRISTIAN VANG



*Fyri hálvumtriðja ári síðani fingu foreldrini ongantíð eygnakontakt við Rebekku. Hon vildi ikki nemast, kendist ikki við navn sítt og stríddist við nógv onnur autismu eyðkenni. Í dag er hon ein aktiv, blíð genta, sum prátar og spælir sum aðrar fimm ára gamlar gentur.*

brúkast, og øll tilsetningsevni vóru bannað.

– Tað er heldur eingin góða mamma, matskráin má fylgjast 100 prosent, um tað skal hjálpa, greiðir Monika frá. Maturin skuldi lekja tarmarnar og tí vera so lættur at sodna sum møguligt. Í fyrstuni skuldu gularøtur kóka í fýra tímar, og sjálvt súrepli skuldu vera væl kókað.

Og Rebekka gjørdi ógvusliga mótstøðu, bæði kroppsliga og sinnisliga. Skarnið var so sterkt, at hon kundi ikki longur brúka blæðu, og bæði eygu, oyru og nøs fyltust við tjúkkari gulari vætu. Sinnisliga gjørdist hon so aggressiv, at tað var, sum hevði hon øgiligar abstinensir. Hetta vóru tey eisini fyrireika uppá av læknunum.

– Nei, tað var einki stuttligt. Vit máttu gera okkum gróthørð og noyða matin niður í hana, og høvdu vit ikki trúð uppá tað og staðið saman um tað, hevði tað ongantíð gingið, sigur Monika avgjørd.

### Fingu dóttrina aftur

Tað gingu bara nakrir dagar, so sóu tey mun, og sum vikurnar gingu, broyttist Rebekka meir og meir. Hon byrjaði at tosa, bleiv reinfør og legði upp til samband.

· Um morgnarnar kom hon til dømis inn í okkara song, tað hevði hon ikki funnið uppá áðrenn. Tað var, sum var hon komin aftur til okkara, sigur Monika.

Hon viðgongur, at tað er strævið at hava eitt barn, sum ongantíð kann eta tað, sum vit halda er vanligt. Og fyrsta tíðin var ræðulig.

– Men tað er nógvar ferðir verri at hava eitt barn, sum er lammað av autismu, leggur hon afturat.

Rebekka hevur mennt seg nógv meir enn Monika nakrantíð hevði torað at droymt um, men henni tørvar framvegis stuðul.

– Hon tosar bæði føroyskt og enskt, tí pápin er ættaður úr USA. Og hon er eisini byrjað at lesa og skriva enskt. Men hon dugir ikki líka væl at greiða frá, sum børn á hennara aldri, og hon kann verða frustrerað, tá hon ikki fær fylgt við í spæli saman við øðrum børnum, greiðir Monika frá.

Hennara trupulleikar í dag kunnu tó ikki samanberast við støðuna fyri hálvum triðja ári síðani, tá autistiska myrkrið fylti alt. Tá hugdi hon ongantíð uppá foreldrini, hon reageraði ikki uppá navn sítt, og einasta sambandið, sum foreldrini høvdu við hana, var grátur og skríggj.

– Okkara lív er fullkomiliga broytt til tað góða. Bara tað, at Rebekka ikki longur liggur vakin fleiri tímar hvørja nátt, ella bara tað at hon er reinfør, ella bara tað, at hon hevur fingið javnvág og kropskenslu aftur, ella bara tað at vit nú kenna dóttur okkara og síggja hana læra og mennast, ja, eg kundi blívið við, sigur Monika og smílist.

### Ikki góðtaka autismu

Talið av børnum, sum verða rakt av autismu, veksur við rúkandi ferð. Eisini – og ikki minst – í Føroyum. Fyri Moniku, sum meginpartin av tíðini býr í einum avbyrgdum ættarbólki í Filipsoyggjunum, er hetta serliga týðuligt.

– Tað búgva eini 18.000 fólk í økinum, har sum vit eru. Vit hava eina heilsustøð, so eg havi møtt flestu teirra, men eg havi enn ikki møtt nøkrum, sum hevur autistiskt eyðkenni. Og kanska er orsøkin, at hesi fólk ikki liva í okkara dálking, og tey bara eta mat, sum tey sjálvi gera til.

Monika leggur dent á, at eingin løtt loysn er fyri alla autismu. Orsøkirnar til sjúkuna eru ymiskar, og sama viðgerð riggar ikki til øll. Monika veit um børn, sum fylgja somu kostætlan sum Rebekka, sum ikki hava havt líka stóra onkran framgongd , men hon hevur ikki hoyrt um nakran, sum als onki gagn hevur havt av slíka kostumlegging.

– Og eftir at hava sæð, hvørja ávirkan maturin hevur havt á Rebekku, eri eg onga løtu í iva um, at autisma ikki bara er eitt brek í heilanum. Tað er ein sjúka, sum situr í kroppinum, serliga í tarmunum.

Og tað er ein sjúka, sum ikki bara skal góðtakast sum ein ólekilig støða. Um dálking er ein týdningarmikil orsøk til autismu, kunnu vit ikki lata standa til, men royna at broyta tað, sum vit kunnu.

– Epidemiir skulu ikki góðtakast, staðfestir Monika álvarsom, sum vit reisa okkum frá borðinum, og eg sigi farvæl. Rebekka situr og leggur perlur saman við systrunum, sum eru komnar inn, meðan vit hava prátað. Vit síggjast, rópar hon, tá eg fari út ígjøgnum hurðina.

## Gransking um kost og autismu

Dansk Center for autisme kunngjørdi í mars 2010 úrslitini frá einari tvey ára granskingarverkætlan nevnd ScanBrit kanningin. Í hesari vísindaligu kanning var hugt at sambandinum millum kostumlegging og autismu. Granskingarverkætlanin var eitt samstarv millum Dansk Center for autisme og universitet í Bretlandi og Noregi. 60-70 børn við autismu órógvi vórðu býtt í tveir bólkar, bólkur A (sum beinanvegin fekk kost uttan gluten og mjólk (kasein), og bólkur B (sum ikki fekk broyttan kost fyrstu 12 mánaðirnar). Seinna árið fingu báðir bólkar gluten- og kaseinfrían kost. Niðurstøðan frá granskingarverkætlanini var, at tað statistiskt kundi ávísast, at nøkur børn fingu ágóða av kostumlegging. Týðuligasti batin kundi staðfestast innan hugsavnan og hyperaktivitet, men eisini innan samskifti og endurtakandi atferð sást ein munur, serliga hjá bólki A. Dansk Center for autisme sigur, at tey ikki vilja viðmæla øllum foreldrum hjá børnum við autismu at broyta kostin, tí tað ber ikki til at avgera, hvørji børn kunnu fáa tað betri og hvørji ikki. Men tey "har forståelse for" teimum foreldrum, sum velja at geva børnum sínum gluten- og kaseinfrían kost. Samstundis leggja tey dent á, at hendan kostbroyting skal vera gjørd í samráð við lækna.

### Aðalfundur og fyrilestur hjá Autismufelagnum

Aðalfundurin hjá Autismufelagnum verður leygardagin 5.mars , klokkan 15 í MBF-húsinum. Og Lennart Pedersen, chefpsykologur hjá Center for Autisme kemur til Føroyaat halda fyrilestur í Miðlahúsinum týsdagin 22. mars. Fyrilesturin fer millum annað at snúgva seg um hesar spurningar: Hvussu eru diagnosurnar autisma og Aspergers syndrom nýttar í dag? Er nakar munur á børnum, sum bera brekið infantil autisma og børnum, sum bera brekið Aspergers syndrom? Er munur á teirra menning og framtíðarútlitum? Harumframt hava foreldur og avarandi hjá fólki við autismu møguleika at fáa persónliga ráðgeving hesa vikuna, sum Lennart Pedersen vitjar í Føroyum.